

# Atlantic Petroleum borar týðandi brunn í Norra

Deil:

**Jan Müller**

06.10.2014 - 14:29

Oljan.fo

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er farið undir enn eina spennandi boring á norska landgrunninum.

Tað er boringin av brunninum "Ivory", har Atlantic eigur 9%. West Navigator skal bora og er boringin mett at taka 60 til 90 dagar. Áhugart er at brunnurin er í einum sera lovandi olju- og gassøki, har stóra fundið Aasta Hansteen varð gjørt nøkur ár herfyri. Tann keldan fer undir framleiðslu í 2017.

Centrica Resources (Norge) er fyrsitøðufelag við 40%. Hini feløgini eru Statoil Petroleum 35%, Rocksource Exploration Norway 10%  and Repsol Exploration Norge 6%. Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroeum sigur í eini viðmerking, at hetta er onnur boringin hjá felagnum í Norra. Fer henda boringin at eydnast væl, so fær hon eisini stóran týdning fyri onnur loyvi hjá felagnum í grannalagnum.